*Johan Mortensen, bretskur konsul:*

# Tørvur á politiskum dialogi við Bretland

*-Eg eri sera fegin um orðini hjá formanninum í uttanlandsnevndini í Sosialinum í gjár um at fáa í lag politiskan dialog millum Føroyar og Bretland. Eg havi longu latið hesa áheitan fara víðari til mínar h eimildarmenn sigur bretski konsulin í Føroyum*



Bretski konsulin í Føroyum, Johan Mortensen er sera fegin um úttalilsini hjá Helenu Dam á Neystabø, formanni í uttanlandsnevndini, í Sosialinum í gjár, har hon eftirlýsir ein politiskan dialog við Bretland

Vit hava eitt vaksandi samstarv við Bretland, og tað er greitt, at tú saman við einum øktum sambandi eisini skal hava ein politiskan dialog. At føroyskir parlamentarikarar kunnu møta bretskum starvsbrøðrum er nettup tað, sum skapar felags forstáilsi millum lond

Johan Mortensen, sum hevur verið bretskur konsul í nøkur ár sigur, at seinastu ferð, at samband hevur verið millum løgtingið og bretska parlamentið, var tá Pauli Ellefsen, løgmaður saman við Sofus Poulsen vitjaði í Whitehall

-Síðani tá hevur einki samband verið, og eg haldi tað er ógvuliga spell, og tí eri eg fegin um, at tað frá løgtingsins síðu verður lagt upp til eitt ynski um ein dialog, og eg skal fegin bera víðari hetta ynskið til mínar heimildarmenn sigur Johan Mortensen, sum heldur tað er ógvuliga týdningarmikið, at Føroyar og Bretland fáa góð viðurskifti við hvør annan, tí bæði londini hava brúk fyri tí, nú tað bendir á, at ein tann stóra framtíðar oljuprovinsin kemur at liggja júst á økinum millum hesi bæði londini. Saman hava vit ómetaliga stórar møguleikar, men harvið er ikki sagt, at vit ikki eisini skulu samvinna við onnur lond so sum Danmark og Noreg. Johan Mortensen vísir tó á, at sum næsti granni okkara er tað einki meira enn natúrligt, at vit gera alt fyri at økja og menna samvinnuna við Bretland, báðum londum at gagni

jan


## VALUTAKURSIR

| | | 05.01.96 | Ultimo síðsta mán. |
|---|---|---|---|
| USA | Dollari | 555,40 | 555,15 |
| Bretland | Pund | 866,34 | 857,82 |
| Týskland | Markur | 387,10 | 387,59 |
| Svøriki | Króna | 84,53 | 83,43 |
| Noreg | Króna | 87,89 | 87,91 |
| Frakland | Frankur | 113,17 | 113,44 |
| Belgia | Frankur | 18,850 | 18,884 |
| Sveits | Frankur | 480,06 | 482,62 |
| Holland | Gyllin | 345,70 | 346,25 |
| Italia | Liri | 0,3547 | 0,3511 |
| Finnland | Markur | 128,45 | 127,71 |
| Ísland | Króna | 9,52 | 9,51 |
| Eysturríki | Skillingur | 55,073 | 55,126 |
| Spania | Pesetas | 4,602 | 4,580 |
| Portugal | Escudos | 3,728 | 3,721 |
| Kanada | Dollari | 412,17 | 407,40 |
| Grikkaland | Drakmur | 2,386 | 2,369 |
| Japan | Yen | 5,3344 | 5,3971 |
| Írland | Pund | 894,32 | 886,81 |
| | XEU | 716,15 | 711,76 |

Kelda: Føroya Sparikassi

## Skrivstovufólk

**søkist til Føroya Musikkskúla**

**Umsóknarfreist:** Fríggjadagin 26. januar 1996
**Starvsbyrjan:** Hósdagin 1. februar
**Arbeiðstið:** Hálvdagsstarv – fyrrapart ella seinnapart eftir avtalu
**Lønarviðurskifti:** Sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Føroya Landsstýri.
**Setanartreytir:** Skrivstovuútbúgving, kunnleiki í enskum og hollur telduførleiki.

Nærri upplýsingar fáast frá musikkskúlaleiðaranum Olavi Hatun, tlf. 16462 (á skrivstovuni) og tlf. 11819 (heima)

Umsóknir eru at senda til:

**Føroya Musikkskúla**
**Falkavegi 6, 100 Tórshavn**
**Tlf. 16462 - Fax 18555**

# Stórur trettandakvøldsdansur

## við HJARNAR, BLACK PANTERS og ÁRSINS SONGRØDD, SIRI

## verður á Kambsdali í kvøld kl. 23^00^

**Uttanlandsferð fyri 2 suðureftir verður burturlutað. Virði 7.000,- kr.**
**Borð og stólar verða sett upp í høllini.**
**Eisini verður møguleiki at keypa sær okkurt til matna.**

ÍF